Fiskimálastýrið
Skipaeftirlitið
Faroese Maritime Authority

Skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir hervið eftir einum skipaeftirlitsfólki til setan skjótast gjørligt.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:
- at hava um hendi tekniska málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkið við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o.ø. feløgum ella persónum, sum hava myndugleika ella eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar.

Førleikakrøv:
Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- skipsførari við sjóvinnubrævi
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni.

Tað er somuleiðis krav, at umsøkjarin hevur minst 5 ára starvsroyndir.

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring).

Í starvinum er møguleiki at fáa skipaða eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður sett sum eitt krav, um hetta ikki er lokið.

Setanartreytir:
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

Umsóknir:
Umsóknir saman við avriti av prógvum møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 18. februar 2002, kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

Skipaeftirlitið,
Postsmoga 112 · 110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 311188 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

Skipaeftirlitið
J. Broncksgøta 5 · Postboks 112 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 311188 · Fax (+298 318882
E-postur: skipaeftirlitid@skipaeftirlitid.fo

Størv

Avgreiðslufólk

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir avgreiðslufólkum til farmastøðina í Tórshavn.

Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini
Høvuðsuppgávan hjá farmastøðini, sum er undir farmaflutningsdeildini, er at samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

Uppgávurnar hjá avgreiðslunum
Høvuðsuppgávurnar hjá avgreiðslufólkunum eru at vera við til at:
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar

Førleikakrøv
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Trukkprógv
- Góðan røkjuskap
- Kundavinarligur

Setanartreytir
Størvini verða sett eftir høvuðssáttmálanum hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

Umsóknir
Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343061 ella post: hab@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilslígum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

Lýsið
við
brúktum
bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Frá Vága Javnaðarfelag

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður í húsinum hjá Sørvágs Húsmøðrafelag hósdagin 7. februar kl 19.00.

Vága Javnaðarfelag

Frá N.S.Í.

Aðalfundur felagsins verður í NSÍ-hølinum mikukvøldið 20. februar 2002 kl. 20.00.

Fundarskrá: grein 9 í lóg fyri Nes Sóknar Ítróttarfelag.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Würth Danmark A/S er en af Danmarks største leverandører af befæstigelse, hånd-/elværktøj, lagersystemer, personlig beskyttelse m.v. til professionelle brugere i auto-, metal-, el- og byggebranchen.
Vi er i Danmark mere end 400 medarbejdere og vi omsætter for omkring 500 mill kr. om året. Würth Danmark A/S er et datterselskab i den internationale Würth koncern, der lister mere end 200 selskaber fordelt over hele kloden.
Koncernen omsætter for ca. 35 milliarder kr. og har over 36.000 ansatte.
Würth lægger vægt på et sundt arbejdsmiljø, hvor medarbejdernes arbejdsglæde, trivsel og tryghed sættes i højsædet. Kunst og kultur er tæt knyttet til firmaet. Kunst på væggene, moderne arkitektur og medarbejderkultur sættes højt.

En moderne dynamisk virksomhed.

Læs mere på www.wuerth.dk

SELJARI TIL BYGGIVINNUNA

WÜRTH

Fyri at menna søludeild okkara í Føroyum, sóknast vit eftir einum seljara at taka sær av viðskiftafólki okkara innan byggivinnuna.

Starvslýsing:
Tú skal seta teg í samband við nýggj viðskiftafólk eins og at taka tær av verandi viðskiftafólki
Viðskiftafólkini eru t.d. húsasmiðir, snikkarar, múrarar, málarar, byggifyritøkur v.m.
Títt samband við okkum er við økisleiðaran, og tú kann sjálvur leggja tær arbeiðsdagin til rættis
Vit bjóða tær neyva kunning og øll neyðug skeið í søluarbeiði, fasta løn, provisión og eftirløn

Tín førleiki:
· Tú kann vera handverkari ella hava royndir innan byggivinnuna
· Vit ganga ikki út frá at tú ert seljari, tí hesa útbúgving og vegleiðing vilja vit bjóða tær
· Tú er í tríatiárunum
· Tú tosar føroyskt

Hevur tú nakrar spurningar í hesum sambandi, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Bjarna Schack á starvsfólkadeildini á telefon 0045 — 79 32 32 32, ella Claus Christensen, seljara, á telefon 22 50 17 eftir kl 17.

Umsóknin:
Ert tú áhugaður og hevur hug at royna nýggjar avbjóðingar, skulu vit hava umsókn tína í seinasta lagi mánadagin 11. februar 2002. Umsóknina sendir tú til:

WÜRTH DANMARK A/S
C/o Claus Chrostensen — Essalág 13 - Tórshavn

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað
loysir
seg

Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir pedagogi/starvsfólki til Føroya Barnaheim at byrja 1. mars 2002 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv á ungdómsdeildini, Nýggjustovu. Arbeiðstíðin er skiftandi og fevnir um alt døgnið.

Nýggjastova er normerað til 6 ungfólk í aldrinum 12 – 18 (20) ár, umframt 2 bráfangis pláss.

Arbeiði krevur, at tú er før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við foreldur, skúla og onnur.

Uppgávurnar eru fjølbroyttar og verða settar út frá tørvinum hjá tí einstaka barninum/tí unga.

Barnaheimið bjóðar eitt mennandi, krevjandi og áhugavert starv, við møguleika at luttaka á fakligum skeiðum.

Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum og viðmælum skal sendast til: Stýrið fyri Føroya Barnaheim, Pedda við Steinsgøta 10, FO-100 Tórshavn, att.: Fríða Patursson, innan 22. 02.2002.

Viðkomandi, ið settur verður, verður lønt/ur sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til virkandi leiðara Mirjam Johannesen á tlf. 312320.

Føroya Barnaheim
Pedda við Steinsgøta 10 • FO-100 Tórshavn
Tlf: 312320 • Faks: 311886 • T-postur: fbh@post.olivant.fo

Bilur við skaða til sølu

Merki: Suzuki Grand Vitara 1.6
Árg.: 2000
KM.: 9.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729 · fax 345607
at hitta: mánadag-hósdag kl. 08.00-10.00
og fríggjadag 08.00-16.00

Almenn útbjóðing

Viðareiðis Kommuna ynskir tilboð uppá at grava umleið 550 m av vatnleiðingsrørum niður. (ABF 92, dagf. 8. januar 2001 er galdandi fyri arbeiðið).

Tilboðið skal vera í 2 stigum:

Stig 1: 350 m 2½" rørum (prísur fyri seg)
Stig 2: 200 m av 4" rørum (prísur fyri seg)

Kommunan útvegar rør.

Nærri upplýsingar um arbeiðið fáast við at venda sær til Kommununa.

Kommunan skilar sær rætt til at velja ímillum innkomin tilboð, og møguliga ikki taka av nøkrum tilboð.

Møgulig tilboð skulu vera Kommununi í hendi í seinasta lagi 15. febr. 2002.

Viðareiðis Kommuna
750 Viðareiði
Tlf. 451083 · Fax 451094

Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu

Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.

ALTI 2100 til rúm stødd ur uml. 50-80 m²	prísur einans	kr. 1.895,-
ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 m²	prísur einans	kr. 2.095,-
ALTI 2214 til rúm stødd ur uml. 200 m²	prísur einans	kr. 2.995,-

SPF. ALTING tlf. 210 298 fax 318 591
Vit senda um alt landið

Sosialurin –har tað hendir

Veðrið
Sosialurin
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk